Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Bjarni Kárason Petersen, løgtingsmaður

Svarari: Jenis av Rana, landsstýrismaður í uttanríkis- og mentamálum

Evni: Lofteftirlitsradarin

Spurningar:
1. Kann landsstýrismaðurin vátta, at ongin avgerð – hvørki formlig ella óformlig – er tikin av føroyskum og/ella donskum myndugleikum um lofteftirlitsradaran, sum eftir ætlan skal setast upp á Sornfelli?
2. Kann landsstýrismaðurin vátta, at endaliga avgerðin um at seta upp lofteftirlitsradara á Sornfelli verður tikin í Løgtinginum ígjøgnum løgtingssamtykt ella aðra løgtingsfyriskipan?
3. Metir landsstýrismaðurin, at avgerðin um lofteftirlitsradaran kemur undir §52 stk. 2-3 í stýrisskipanarlógini, har ásett er, at landsstýrið ikki kann gera avtalur, sum krevja luttøku Løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar?

Viðmerkingar:
Málið um lofteftirlitsradaran, sum danska verjumálaráðið ynskir at seta upp á Sornfelli, er eitt stórt og prinsipielt mál. Tað er greitt, at danska stjórnin ynskir at fáa ein lofteftirlitsradara í Føroyum, og er enntá politisk avtala gjørd í Fólkatinginum um hetta við sonevnda «kapasitetspakkanum», har avtala er gjørd millum flokkarnar í Danmark um at seta 390 mió. kr. av á donsku fíggjarlógini til endamálið. Tískil kann mann seta spurnartekin við, hvar málið liggur í avgerðartilgongdini, og um avgerðir longu eru tiknar á økinum við heimild í verandi lóggávu. Tí verður spurt, um avgerðir longu eru tiknar av donskum og/ella føroyskum myndugleikum í málinum um lofteftirlitsradaran.

Tað er ikki heilt greitt, hvørja støðu landsstýrismaðurin hevur til málið, og heldur ikki hvussu málsviðgerðin skal fara fram. Landsstýrismaðurin hevur verið til ráðførslu við Uttanlandsnevndina, og hevur lagt ætlan fyri samráðingargongdina við danskar myndugleikar um ætlaða radaran á Sornfelli. Eftir ætlan fer landsstýrismaðurin, eftir at samráðingarnar eru lidnar, í Uttanlandsnevndina við samráðingarúrslitinum, fyri síðani at gera eina møguliga avtalu um radaran.

Tað er tó ikki greitt, um avtalan verður av slíkum slag, at hon kemur undir ásetingina í stýrisskipanarlógini um millumtjóðasáttmálar, sum krevur luttøku Løgtingsins. Tí verður spurt, hvørt avgerðin um lofteftirlitsradaran skal til viðgerðar, og hvørt avgerðin um radaran skal endaliga samtykkjast í Løgtinginum.

Á Løgtingi, 21. apríl 2021
Bjarni Kárason Petersen